# Oddagrein

**Jan Müller**
jan@sosialurin.fo



# KUNNU LÆRA AV GRØNLENDINGUM

Føroyar og Grønland hava í øldir samstarvað á mongum økjum. Bæði sum fjarskotnar grannatjóðir við sama íbúgvaratali og nærum somu vinnusamanseting, umframt sum partur av Ríkisfelagsskapinum. Nú vit fara inn í eitt nýtt ártíggju er tað helst rætt at endurskoða og endurnýggja samvinnuna, mentanarliga og vinnuliga.

Báðar tjóðirnar eru ríkar upp á náttúru og náttúrutilfeingi. Fiskivinnan hevur átt lívið í okkum. Blokkurin úr Danmark hevur verið gott ískoyti til landshúsarhaldini. Nú eru tekin til, at vit eru nógv ríkari, enn vit gera okkum greitt. At vit í undirgrundini eiga tilfeingi, sum heilt kunnu broyta grundarlagið undir okkara samfeløgum. Ikki tí at pengar og handlig virði skulu vera okkara eitt og alt, men tey eru ein av fortreytunum fyri einum góðum og tryggum vælferðarsamfelag.

Bæði londini hava sett út í kortið eina ætlan um at finna tey goymdu virðini í undirgrundini. Oljufeløg bjóða sær til at brúka milliardir av krónum til at finna hesi virði. Tíðin er komin hartil - sum landsstýrismaðurin Johan Dahl eisini rør framundir - at vit eiga at samstarva og læra av hvørjum øðrum, har tað er skilagott og rætt.

Tað var spell, at Faroe Petroleum ikki fekk leitiloyvi í Grønlandi, tí tá vóru orsøkirnar ella motivatiónin fyri einum ítøkiligum samstarvi kanska betri, men henda sannroynd eigur ikki at forða fyri dialogi og samstarvsmenning. Vit eru fá, og nettupp tí eiga vit at byggja brýr til samvinnu. Saman standa vit sterkari. Føroyingar eiga mong útbúgvin fólk, sum kundu verið partur av oljumenninginI í Grønlandi. Og grønlendingar hava eisini longu bygt upp royndir, sum vit kundu fingið gleði av. Eitt nú hava teir tryggjað sær ein grønlendskan lut upp á umleið 12.5% í øllum loyvum, ið verða latin.



Oljuráðleggingarnevndin ráddi á sinni frá at stovna eitt alment føroyskt oljufelag. Tíðin er búgvin til, at vit taka hetta málið framaftur. Ein byrjan kundi so verið at hugt eftir, hvussu grønlendingar hava borið seg at og hví. Vit eiga at tora at taka fram aftur avgerðir, sum vórðu tiknar tá og spyrja: krevur nútíðin og framtíðin av okkum, at hesar avgerðir verða endurskoðaðar – og her møguliga eisini við grønlendskari hjálp.

**Tíðin búgvin at taka ætlanina um alment oljufelag framaftur**

# Stórar ætlanir – eingi úrslit




Løgtingið samtykti 31. mai í ár at broyta løgtingslógina um Húsalánsgrunnin. Eftir hesi broyting av lógini fær Húsalánsgrunnurin møguleika til at veita lán til sethus og íbúðir, har endamálið við láninum er at fíggja endurnýggingar og umbyggingar, soleiðis at orkunýtslan minkar.

Hetta er tó bert ein partur av uppskotinum, sum áður eisini hevði ásetingar um serligar lutaíbúðir, ætlaðar fólki við breki, men hesin parturin varð tikin burtur, og tað harmast forkvinnan í MBF, Leila Solmunde, stórliga um.

- Vit høvdu tað upprunaliga uppskotið til hoyringar, og kundu tá bert fegnast um, at nú hómaðist ein serligur fíggingarmøguleiki, m.a. til fólk, sum bert hava eina fyritíðarpensión. Hesi fólk hava ongar sum helst fíggjarligar møguleikar at finna sær býli á privata íbúðarmarknaðinum, sigur Leila Solmunde, sum staðfestir, at politiski myndugleikin hevur ongantíð áður havt so stórar ætlanir, men samstundis hevur ongantíð verið gjørt so lítið sum nú.

- Í sonevnda bústaðarpakkanum, sum vit nú hava bíðað eftir í mong ár, var umframt leigulógin, alternativir bústaðarmøguleikar og serligir fíggingarmøguleikar til fólk við breki. Men nú, tá avtornaði, verður bert møguleikin at fáa lán til bjálving. Hetta hóast at sagt verður í samgonguskjalinum, at ætlanin er at gera møguleikar fyri alternativa íbúðarbygging. Her er langt millum orð og gerðir, má forkvinnan í MBF ásanna.

Leila Solmunde sigur seg vera sera hørm um ta lagnu bústaðarpakkin higartil hevur fingið.

- Eg havi veruliga trúð tí sum politikkararnir hava sagt um nógv umtalaða bústaðarpakkan, og sum vera man serliga tá ræður um bústaðarmøguleikar fyri brekað og serligu fíggingini, sum talan hevur verið um. Men nú trúgvi eg satt at siga einki uppá tað longur. Er eri ómetaliga vónsvikin av at politikkararnir ikki vilja annað og meira við Húsalánsgrunninum nú broytingar eru samtyktar, sigur forkvinnan í MBF sum heldur, at um vilji ikki er til lutaíbúðir, so kundi verið byrjað við leiguíbúðum.

- Politiska tosið um bústaðarpakka í mong ár er at halda fólk fyri tað turra spott. Tað var nógv betri um politikkararnir søgdu erligt, at teir ikki ynskja nakrar alternativar bústaðarmøguleikar, tí so vistu vit tað, sigur Leila Solmunde.

*Torfinn Smith hevur skrivað greinina til MBF blaðið sum kemur út í næstu viku.*



**Ræðumyndin er fólkaminking**

LEVI MØRK
KJAK Á SÍÐU 78



**Seta sálarfrøðing í Klaksvík**

ELISABETH G. HANSEN
KJAK Á SÍÐU 20

# Tekur farloyvi tá tað er neyðugt

Sambært Høgna Hoydal, so ber tað væl til at røkja løgtings- og fólkatingsstarvið samstundis. Hjá honum ber tað so væl til, at hann teir 64 seinastu tingfundirnar ikki hevur havt fyri neyðini at biða varamann sín, Páll á Reynatúgvu, um at møta fyri seg í løgtinginum.

Ikki fyrr enn týsdagin - tá tingfundur nummar 65 síðani hann seinast hevði farloyvi skuldi haldast, var neyðugt at fáa varamannin inn.

- Eg boðaði beinanvegin frá, tá eg varð valdur í Fólkatingið, at er fór at taka farloyvi frá løgtingstingarbeiðinum í tann mun tað fall saman við arbeiðinum í Fólkatinginum. Og tað hevur í langa tíð ikki verið neyðugt at fingið farloyvi, tí tað hevur væl borið til at røkt bæði størvini, sigur Høgni Hoydal.

Hann vísur aftur, at tinglimir hjá Tjóðveldi nú binda um heilan fingur og biðja um farloyvi, fyri at viga upp ímóti øðrum førum, har tinglimir hava verið burtur uttan at fáa næsta fólk á listanum inn fyri seg.

Í løtuni eru bæði Páll á Reynatúgvu og Heidi Petersen á tingi, tí bæði Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen eru burturstaddir. Høgni Hoydal á Fólkatingi og Torbjørn Jacobsen í ørindum fyri Runavíkar kommunu sum havnarmeistari. Hann er til cruisestevnu í franska býnum Cannes.



Tá Høgni Hoydal var landsstýrismaður í CHE samgonguni í 2008, røkti Sjúrður Skaale fólkatingsarbeiðið fyri hann. Tá segði Sjúrður Skaale, at tað ber ikki til at røkja løgtings- og fólkatingsarbeiðið samstundis, og hann legði tí løgtingssessin frá sær alla tíðina, hann var í Fólkatinginum.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*